FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Laborantur til Náttúruvísindadeildina

Søkt verður eftir laboranti til starvsstovuna á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum við setan frá 1. august 2009 ella skjótast gjørligt.

**Starvið**
Starvið er ¾- tíðar starv. Tað fevnir um:
- Starvsstovuarbeiðið, so sum:
  - Kemiskar, fysiskar og biologiskar analysur
  - Framleiðslu og keyp av reagensum
- Viðlíkahald av starvsstovutólum
- Heintan og fyrireiking av sýnum til kanningar
- Faklig vegleiðing av studentum

**Førleiki**
Vit vænta at tú:
- ert laboratoriuteknikari ella laborantur við starvsroyndum
- ert opin fyri førleikamenning
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samskiftisevni
- ert røkin
- hevur kunnleika til vanlig telduforrit

**Løn**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, fl. IV.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum viðmælum, skulu vera Náttúruvísindadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin 17. juni 2009. Umsóknir skulu sendast til: Náttúruvísindadeildin, Postrúm 2109, FO 165 Argir.

**Meir at vita**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Svein-Ole Mikalsen á tel. 352550 ella teldupostadressu sveinom@setur.fo við evninum "Laborantstarv".

---

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo





Tvey atgongumerkir til Mötley Crüe konsert í KB-Hallen 10. Juni eru til sølu fyri 495,- kr. pr stk.

ÁHUGAÐI RINGIÐ Á 220022


# Avloysari fyri skrivara í Fuglafjarðar skúla

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara fyri skúlaskrivaran í Fuglafjarðar skúla at arbeiða partstíð (0,75) fyri tíðarskeiðið frá 01. juli 2009 at rokna ella skjótast eftir hetta fram til 31. januar 2010.

**Søkt verður eftir avloysara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans kann avgreiða fyrisitingarligar uppgávur skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligur og nærlagdur

**Harafturat skal viðkomandi av og á kunna arbeiða í skiftandi arbeiðstíðum**

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður í avloysarastarvið, skal hava góðan málførleika eins og neyðugt er at hava góðan førleika at nýta teldu

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður løn sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi 05. juni 2009 kl. 15.00.

Nærri kunning um starvið fæst við at seta seg í samband við Richard Johansen, skúlastjóra á telefon 737761. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: richard.johansen@skulin.fo.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjarðar skúli hevur umleið 300 næmingar í 15 flokkum. Við skúlan starvast 33 lærarar, 1 skrivari, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**

**Frá Heilsuhjálparafelag Føroya**

Í samband við at Heilsuhjálparafelag Føroya verður 30 ár 26. mai, verður opið hús í hølum felagsins Fr. Petersensgøta 7, Tórshavn. hendan dagin frá klokkan 14.00 til 19.00, fyri áhugaðum og limum

**Nevndin**

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Lærarar til HT-útbúgvingina

**Søkt verður eftir undirvísarum at byrja í august 2009.**

**Tøkni A-stig, Miðlar & Samskifti**
Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur eina viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni og hevur kunnleika til miðlar og kunningar- og samskiftistøkni.
Lærugreinin er 10 tímar/viku.

**Samskifti C-stig**
Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur eina viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni og hevur kunnleika til miðlar og kunningar- og samskiftistøkni.
Lærugreinin er á 3 tímar/viku.

**Alisfrøði A-stig**
Vit kunnu hugsað okkum, at tú hevur Master (MA) í nátúruvísindi.
Lærugreinin er 5 tímar/viku.

**Stjørnufrøði C-stig**
Vit kunnu hugsað okkum, at tú hevur Master (MA) í nátúruvísindi.
Lærugreinin er 3 tímar/viku.

**Idésøga, B-stig**
Vit kunnu hugsað okkum, at tú hevur Master (MA) í heimsspeki, samfelagfrøði ella líknandi útbúgving.
Lærugreinin er 4 tímar/viku.

**Tøknisøga, C-stig**
Vit kunnu hugsað okkum, at tú hevur Master (MA) í heimsspeki, samfelagfrøði ella líknandi útbúgving.
Lærugreinin er 3 tímar/viku.

**Programmering C-stig**
Vit kunnu hugsa okkum, at tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan programmering.
Lærugreinin er 3 tímar/viku

**Tónleik C-stig**
Vit kunnu hugsa okkum, at tú hevur kunnleika innan tónleik og undirvísingaroyndir.
Lærugreinin er 3 tímar/viku

**Setanartreytir o.a.**
Lutvís er talan um tvørfakliga undirvísing og samstarv í toymi. Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið og størvini eru tíðaravmarkaði fram til 25. juni 2010.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum í seinasta lagi 8. juni 2009.

Eru spurningar, so eru áhugað vælkomin at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra, tlf. 456311 ella fartelefon 214407.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
FO-700 Klaksvík

---

**Tekniski Skúlin í Klaksvík** er sjálvognarstovnur og vinnuskúli. Á skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timbur yrki. Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi og fakliga og námsfrøðiliga menning.